# Gullllaksasesongin frægari í ár

**- Í fjør var marknaðurin vánaligur, men í ár hevur hann verið betur, tó at vit kundu ynskt okkum, at hann var uppaftur betur. Hetta árið hevur helst ikki verið so gott hjá skipunum; tey hava fingið lægri prís, samstundis sum oljuútreiðslurnar eru øktar, sigur Jóan Magnus Rasmussen, sum kortini væntar, at gullllaksasesongin hevur verið líka fræg fyri skipini, sum tíðin annars hevði verið, um tey vóru á upsaveiði í hesum tíðarskeiði**

GULLLAKSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Leirvíkingar hava slóðað fyri við gullllaksinum, og teir slóðaðu eisini fyri, tá ið farið varð undir at turka høvd til útflutnings*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Gulllaksatíðin er av á hesum sinni og tey fýra skipini, sum hava verið á gullllaksaveiði, Polarhav, Stjørnan, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, eru farin aftur á upsaveiði.

Á Tavuni í Leirvík, har tey hava arbeitt gullllaks í summarhálvuni í meira enn 10 ár, eru tey farin at rigga til at arbeiða upsa, soleiðis sum tey hava gjørt í vetrarhálvuni í fleiri ár.

## Betur í ár

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri á Tavuni, sigur, at tey eru nøgd við gullllaksasesongina í summar.

– Í fjør var marknaðurin vánaligur, men í ár hevur hann verið betur, tó at vit kundu ynskt okkum, at hann var uppaftur betur.

Keyparalondini eru fleiri, harav Noreg er hitt størsta, og gullllaksafarsið verður avskipað gjøgnum alt árið.

– Vit hava søluavtalur um alla framleiðsluna, sigur hann.

Skipini byrjaðu fyrr at fiska í ár enn vanligt hevur verið, men tey góvust eisini nakað fyrr.

– Vit plaga at siga, at vanliga sesongin er frá mai og til og við september, men í ár arbeiddu vit allan apríl mánaða eisini.

Hann vísir á, at í fjør byrjaðu skipini ikki at fiska fyrr enn fyrst í juni – og tey góvust longu til ólavsøku.

Jóan Magnus sigur, at nú framleiðslan av gullllaksafarsi er liðug fyri hesaferð, hevur Tavan keypt 5.200 tons av rávøru.

– Vit settu nøsina upp ímóti teimum 5.500 tonsunum í ár, so hetta er á góðari leið. Í fjør keyptu vit einans 2.200 tons, tá ið marknaðurin var so vánaligur. Í 2001 keyptu vit størstu nøgdirnar nakrantíð, nevniliga 8.200 tons.

Aftrat nøgdunum, sum Tavan hevur keypt, eru nakrar lastir eisini lagdar upp í Kollafirði, so talan er helst um eina samlaða gullllaksaveiði í ár, sum liggur um eini 7.000 tons.

## Lakari fyri skipini

Stjórin heldur ikki, at hetta árið hevur verið so gott hjá skipunum, sum hann kundi ynskt sær.

– Skipini hava fingið lægri prís, samstundis sum oljuútreiðslurnar eru øktar. Vit vóna, at prísirnir verða betur komandi ár, so meira eisini verður eftir til skip og manningar, sum vit hava gott samstarv við.

Hann sigur, at skal gullllaksafiskiskapurin loysa seg, er neyðugt, at nøgdirnar, sum skipini fáa, eru stórar.

– Eg vænti tó, at gullllaksasesongin hevur verið líka fræg fyri skipini, sum tíðin annars hevði verið, um tey vóru á upsaveiði í hesum tíðarskeiði.

Jóan Magnus veit frá skipunum at siga, at tey eisini havt havt aðrar trupulleikar at drigist við í summar.

– Soleiðis, sum eg havi skilt, eru gullllaksaskipini vorðin nógv órógvaði av svartkjaftaskipunum, sum stundum hava ligið so innarliga. Svartkjaftaskipini hava trolað á somu leiðum, sum gullllaksaskipini plaga at royna á, og hetta hevur órógvað fiskiskapin hjá teimum. Somuleiðis hava svartkjaftaskipini havt loyvi at fiskað á leiðum, har gullllaksaskipini ikki sleppa at fiska.

## Betur skipan

Hann heldur, at nú bløðini skriva, at tað so nógvur svartkjaftur er at fáa, átti svartkjaftaveiðan og gullllaksaveiðan at verið skipað soleiðis, at gullllaksaskipini ikki eru verri fyri úti á fiskileiðunum, enn tey hava verið hesi árini, tey hava verið á gullllaksaveiði.

– Skipini byrjaðu at fiska gullllaks longu í 1992, og tí átti henda veiða at havt tryggjað sær nøkur rættindi á grunninum, heldur Jóan Magnus Rasmussen og vísir á, at tað ikki átti at vera nakað forgjørt, um svartkjaftaskipini vóru nakað ytri enn gullllaksaskipini, sigur Jóan Magnus Rasmussen.

# Tavan fer nú at framleiða portiónir úr upsa

**– Tað hevur gingið væl at fingið fatur á fiski, men nú fleiri skip eru seld, vita vit ikki, hvussu verður í vetur, sigur Jóan Magnus Rasmussen, sum kortini væntar, at virkið fer at fáa nóg mikið av upsa, um góði upsafiskiskapurin heldur fram**

TAVAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at gullllaksurin skapar nógv arbeiði í Leirvík í summarhálvuni og meira enn tað.

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri á Tavuni, sigur, at vanliga verður arbeitt við 17 fólkum í senn í tveimum vaktum – og stundum í trimum vaktum í vertíðini.

Eins og seinastu árini, tá ið gullllaksasesongin er liðug, verður nú lagt um til upsaframleiðslu, og tá eru vanliga 30 fólk til arbeiðis á Tavuni.

Hann væntar, at Tavan fer undir at virka upsa til portiónir um miðjan septem-ber, tá ið teir eru lidnir við onkrar smávegis umvælingar.

– Upsin fer allur til portiónir undantikið tann parturin av flakinum, sum skorin verður frá; hesin fer í blokk.

## Færri skip

Jóan Magnus sigur, at tey miðja eftir at arbeiða eini 2.000 tons av upsa í vetrarhálvuni.

– Tað hevur gingið væl at fingið fatur á fiski, men nú fleiri skip eru seld, vita vit ikki, hvussu verður í vetur.

Hann væntar tó, at tað fer at laga seg við ráfiski, um framvegis nógvur upsi verður at fáa.

Høvuðsframleiðslan hjá Tavuni er gullllaksur, og tey fyrstu árini lá alt virksemið stilt í vetrarhálvuni.

Jóan Magnus Rasmussen sigur, at upsin, sum virkið keypir, vanliga hevur verið góður, og tí hevur fiskurin verið væl egnaður til framleiðslu av portiónum.

– Um einar tvær vikur verður so aftur lagt til brots við upsanum, sigur stjórin við Sosialin.